VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið møguliga ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólgottar og hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Út á sunnudagin veksur hann vindin og regn. Hitin millum 11 og 15 stig.

Summarsólstøður í Sandágerði

Rúnar Reistrup

Hóskvøldið varð skipað fyri tiltaki í Sandágerði í Havn fyri at hátíðarhalda summarsólstøður.

Sólstøður eru teir báðar dagarnar 21. desember og 21. juni, tá sólin stendur ávikavist styttst og longst á himmalinum.

Men eitt slíkt tiltak krevur, at veðrið er hampuligt, og tí liggur tiltakið ikki fast 21. juni. Snarskivan hjá Tórshavnar Kommunu, sum skipar fyri tiltakinum, bíðaði hesuferð til 27. juni, tá veðrið endiliga gjørdist til vildar.

At skipa fyri tiltaki í sandágerði at hátíðarhalda summarsólstøður, hevur verið ein fastur siður hjá høvuðsstaðarkommununi í góð tíggju ár, og eftir fólkamongdini, sum hvørt ár samlast á sandinum, at døma, er tað eitt vælumtókt høvi hjá havnarfólki at koma saman.

Tiltakið byrjaði við ponyríðing fyri tey smáu, og so skjótt eldræddu rossini vóru farin, varð bálið tendrað og røða flutt fram av Jógvani Sundsstein. Síðan varð felagssangur sungin. Eftir sangin var føroyskur dansur.

Jógvan Sundsstein ynskti við einari romantiskari røðu summarinum vælkomnum. Hann heitti á fólk um at njóta føroysku náttúruna, bæði um summarið, og tá veðrið harnar, og gleðast um tað fjølbroytta í føroyska veðurlagnum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	4
Qaqortoq	5
Ammassalik	7
Saint John's	19
Halifax	14
Reykjavík	9
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	10
Lerwick	11
Aberdeen	14
London	17
Tromsø	16
Bergen	14
Oslo	
Stokkhólm	17
Keypmannah.	14
Helsinki	15
Moskva	23
Berlin	18
Warzawa	23
Kiev	24
Bukarest	26
Paris	14
Madrid	20
Róm	25
Malorca	28
Athen	30
Malta	33
Tunis	34
Beijing	29
New Dehli	36
Bangkok	32
Jakarta	29
Sydney	13
New York	31
Miami	27
Los Angeles	21
Meksikobýur	24
Panama	33
La Paz	11
Rio de Janeiro	
Buenos Aires	10

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 987 hPa eystan fyri Skotland fer í landnyrðing.



Í dag:
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum kemur spakuliga hendavegin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 01/07 kl. 06⁰⁰– 02/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,4°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juni: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 01/07 kl. 06⁰⁰– 02/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 0,0 mm

VESTFALLSKYRRINDI

11. juli: Tendring

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
3. juli	02.08	14.40	01.08	13.40	01.23	13.55	04.08	16.40	05.08	17.40	00.23	12.55	11.55	—	02.23	14.55	03.23	15.55	01.53	14.25	03.08	15.40
4. juli	02.57	15.14	01.57	14.14	02.12	14.29	04.57	17.14	05.57	18.14	01.12	13.29	00.12	12.29	03.12	15.29	04.12	16.29	02.42	14.59	03.57	16.14
5. juli	03.32	15.51	02.32	14.51	02.47	15.06	05.32	17.51	06.32	18.51	01.47	14.06	00.47	13.06	03.47	16.06	04.47	17.06	03.17	15.36	04.32	16.51
6. juli	04.10	16.30	03.10	15.30	03.25	15.45	06.10	18.30	07.10	19.30	02.25	14.45	01.25	13.45	04.25	16.45	05.25	17.45	03.55	16.15	05.10	17.30

5 707265 100036 >